UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Landsstýrismálanevndin

Tórshavn, tann 7. oktobur 2024

Góða landsstýrismálanevnd

Landsstýrisábyrgdin er ein ómetaliga týðandi partur av okkara fólkaræðisligu og parlamentarisku skipan, tí tað er avgerandi fyri møguleikan hjá løgtinginum at røkja sítt eftirlit við landsstýrinum sambært stýrisskipanarlógini, at landsstýrið ber løgtinginum rættar upplýsingar. Tí hongur landsstýrisábyrgdin óloysiliga saman við tí fyritreyt, at settir spurningar verða svaraðir í samsvari við sannleikan, og tí krevur løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins, at svar og upplýsingar, sum landsstýrisfólk bera løgtinginum, eru røtt.

Eg meti meg á ongan hátt tilætlað ella av grovum ósketni at hava givið løgtinginum skeivar upplýsingar, og tí takki eg fyri høvið at viðmerkja fyribilsniðurstøðuna í eftirlitsmálinum hjá landsstýrismálanevndini um embætisførsluna hjá mær sum landsstýriskvinnu. Eg harmist um, at tað ikki hevur eydnast at halda fyribilsniðurstøðuna í trúnaði, tí hetta hevur eyðvitað havt við sær, at miðlar og almenningur hava viðgjørt málið á ófullfíggjaðum grundarlagi.

Eg leggi við viðmerkingarnar hjá Umhvørvismálaráðnum til uppritið hjá løgtingsumsitingini, sum landsstýrismálanevndin hevur sent mær til ummælis í óbroyttum líki sum fyribilsniðurstøðu.

Eisini leggi eg við eitt upprit frá Annfinni V. Hansen, sakførara, sum eg havi biðið mett um málið.

Umhvørvismálaráðið, tann 7. oktobur 2024

Ingilín D. Strøm

*landsstýriskvinna*

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn
Tel. (+298) 35 87 00 • umhvorvi@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo